VIÐMERKINGAR

# Hvar fer ein atkvøða fyri Javnaðarflokkinum

**Kunnu tey, ið eru fyri samstarvi innan ríkisfelagsskapin, liva við Javnaðarflokkinum**

**Johan Dahl**
*Sambandsflokkurin*

Javnaðarflokkurin hevur vítt til veggja ríkisrættarligu støðuni. Soleiðis segði formaður Javnaðarfloksins, Jóannes Eidesgaard, í Norðurlandahúsinum sunnukvøldið.



Við øðrum orðum:
Ein atkvøða fyri Javnaðarumboðum er líka væl ein atkvøða fyri loysing sum fyri ríkisfelagsskapi.

**Hasard**
Kunnu tey, ið eru fyri samstarvi innan ríkisfelagsskapin liva við hesum? Er atkvøðan ikki spilt við at atkvøða fyri flokkinum, sum onga fasta støðu hevur til hendan felagsskap?
Ein atkvøða fyri Sambandsflokkinum ella einum av umboðum hansara er ein trygg atkvøða fyri samstarvi innan fyri ríkisfelagsskapin. Alt annað er at spæla hasard við atkvøðu síni.
Valið er einfalt. Vel Sambandsflokkin - tín trygd fyri áhaldandi vælferð og menning.

# Opið bræv til landstýrismannin í vinnumálum og leiðsluna fyri báðar undirsjóartunnlarnar

**John William Joensen**
*formaður í Norðoya Sambandsfelag*



Norðoya Sambandsfelag mótmælir ætlaða príspolitikkinum í Norðoyatunnlinum
Í samband við at stjórin í Norðoytunnlinum í fjølmiðlunum boðar frá at tað verður dýrari at koyra ígjøgnum Norðoyatunnilin enn tað í løtuni kostar at koyra ígjøgnum Vágatunnilin, skulu vit gera vart við at hetta kunnu vit als ikki góðtaka.
Grundgevingarnar hjá leiðsluni um at Norðoyatunnilin er longir og nýggjari og at tað tí skal vera dýrari kunnu als ikki góðtakast.
Ferðslan í norðoytunnlinum verður helst minst tað dupulta av ferðsluni í vágatunnlinum og hinvegin kann roknast við at mundi meiri av tungar ferðslu sum hevur tilknýti til vinnu á landi og sjónum verður í Norðoyatunlinum og tí verða inntøkurnar frá norðoyatunnlinum helst størri enn tær í vágatunnlinum.
Norðoya Sambandsfelag hevur áður boða frá at felagið metur tað vera óheppið at nevndirnar fyri PF. Vága tunnilin og PF Norðoya tunnilin ikki eru mannaðar við nevndarlimum úr vágunum og Norðoyggjum, og er eingin ivi um at hetta eisini verður avspeglað í fráboðaða príspolitikkinum.

**Áheitan á Landsstýrismannin**
Vit fara tí enn einaferð at heita á landsstýrismannin í vinnumálum um at gera lokalu umboðanina í nevndunum fyri undirsjóartunnlarnar sterkari, tí arbeiði í hesum báðum nevndunum hevur avgerandi týdning fyri menningina av ávíkavist Norðoyggjum og Vágoynni.

# Hvørki øsing ella døsing

**Kristian Magnussen**
*Valevni Javnaðarfloksins*



Nøkur fólk eru rættuliga fýrakantað í teirra fatan av politikki og politiskum møguleikum. Hesi fólkini royndu í 6 ár frá 1998 til 2004, at sannføra okkum øll og heimin annars um at ríkisfelagsskapurin forðaði fyri at vit kundu mennast sum tjóð. Teirra loysingarætlan hevði ikki fólksins álit, tí hon bygdi á øsing, uppfunnar trupulleikar og eina ódámliga demonisering av dønum og tí sum danskt.er. Tey hava latið seg í aðrar skortar nú tey bjóða seg fram sum valevnir til fólkatingsvalið, men annars eru tey neyvan broytt.
Vit eru ment ótrúliga nógv sum tjóð undir heimastýrislógini og í ríkisfelagsskapinum. Nú Javnaðarflokkurin stendur á odda fyri eina breiðari politiskari semju, um at endurskoða og endurnýggja ríkisrættarligu viðurskiftini millum Føroyar og Danmark, er umráðandi at Javnaðarflokkurin eisini á Fólkatingi gongur á odda og tryggjar, at henda tilgongd endar við einum úrsliti, sum er til gagns fyri vanliga føroyingin og er við til menna okkum sum tjóð.
Javnaðarfloksins politikkur snýr seg um at skapa grundarlag fyri best møguligum livikorum og menningarmøguleikum hjá føroyingum. Ein hornasteinur í okkara politikki er tíðarhóskandi samstarv í ríkisfelagsskapinum.
Javnaðarflokkurin er ikki til sølu til hægstbjóðandi, tí ein slíkur politiskur hugburður er hugsjónarleysur og ikki sørt kraddarakendur og óvirðiligur fyri okkum sum tjóð.
Tá talan er um fruktagott samstarv í ríkisfelagsskapinum, er Javnaðarflokkurin alternativið til stívrendan sambands- og loysingarpolitikk.

# Vit hugsa nýtt

**Kristian Magnussen**
*valevni Javnaðarfloksins*

Vinnuliga, politiskt og samfelagsliga er neyðugt at hugsa nýtt. Framtíðarstøða Føroya snýr seg um, í hvønn mun vit megna at laga okkum til nýggjar og øðrvísi avbjóðingar. Og hetta er galdandi á øllum økjum.
Javnaðarflokkurin vil altíð ganga á odda fyri vinnuligari, politiskari og samfelagsligari nýhugsan.

# Viðmerkingar til Gallup-kanning

**Javnaðarflokkurin**

Útvarp Føroya almannakunngjørdi sunndagin eina Gallup-kanning, sum vísti, at Javnaðarflokkurin er fremst til Fólkatingsvalið. Men munurin var einans 0.6%-stig.
Úrslitið av kanningini vísir, at Javnaðarflokkurin hevur størri undirtøku millum tey fólk, sum Gallup hevur ringt til. Tíbetur eru hagfrøðilig háttaløg, sum kunnu siga nakað um sannlíkindini fyri, at kanningin vísir eitt rætt úrslit. Tí er tað ein aðalregla, tá veljarakanningar verða kunngjørdar, at hagfrøðiliga óvissan verður nevnd í sama viðfangi. Tað var ikki gjørt í gjár, og harvið kunnu fólk fáa ta fatan, at Javnaðarflokkurin er frammanfyri hinar flokkarnar í veljaraskaranum, hóast tað er greitt, at 0.6% er væl innanfyri hagfrøðiligu óvissuna.
Ábendingar sum vit hava vísa, at Javnaðarflokkurin ikki stendur so sterkur, sum kanningin hjá Gallup vísir. Og tá munurin er so lítil, sum Gallup-kanningin hjá útvarpinum vísir, kunnu smáting sum veðrið gera mun.
Vit halda ikki, at viðgerðin av Gallup-kanningini í útvarpinum og á portalinum higartil hevur verið nøktandi, og vit stúra fyri, at hetta kann skaða Javnaðarflokkin á valdegnum.
Tí vóna vit, at eingin tekur úrslitið sum givið. Eingin skal halda at slagið er vunnið.
Vónandi verður hetta tikið við í viðgerð av Gallup-kanningini í fjølmiðlunum. Og vónandi hava fólk hetta í huga valdagin.

# Sjálvstýrismálið avgreitt

**Kristian Magnussen**
*valevni Javnaðarfloksins*



Nú gera vit sjálvi av, hvussu skjótt vit skulu ganga fram á sjálvstýrisleið. Vilja vit fremja nógvar yvirtøkur, so gera vit tað. Verða ongar yvirtøkur framdar, so er tað tað vit ynskja.

# Lat ikki sjálvstýrisrøddina tagna

**Heidi Petersen**
*løgtingskvinna Tjóðveldisflokkurin*



Farið á val og vísi at vit hava virðing og vilja, føroyingum at frama. X við E.